Louis Wilson vitjaði í Tinganesi í fjør fyri m.a. at greiða løgmanni frá arbeiðinum hjá FISC í Bretlandi mótvegis herferðini hjá umhvørvisfelagskapum móti grindadrápi og sølu av føroyskum fiskavørum. Eisini nevndi Wilson møguleikan fyri at knýta tættari bond millum føroyskar og bretskar politikarar. Mynd jan

Louis Wilson, FISC í London við føroyskar politikarar:

– Komið á tal við bretskar politikarar

-Tað hevði kunnað gagnað føroyskum áhugamálum, um føroyskir politikarar og flokkar komu á tal við politikarar í bretska parlamentinum. Er tað eitt ynski at økja um samvinnuna við Bretland eitt nú í eini komandi oljuvinnu, so er hetta ein máti

Hetta heldur Louis Wilson, sum er oddamaður í felagsskapinum, FISC í London. FISC stendur fyri "Faroe Island Solidarity Committee" og hevur hann til uppgávu at koma við sakligari upplýsing til bretska fólkið um grind og grindadráp.

Louis Wilson, sum er hálvur føroyingur, heldur, at arbeiði teirra at vísa aftur mangan órættvísu og misvísandi herferðini móti grindadrápi og føroyingum hevur givið úrslit. M.a. hava hann, Marjun King og aðrir føroyingar í London gjørt eitt stórt arbeiði fyri at koma á tal við fjølmiðlar, politikarar o.o. og kunna hesi um grindadrápið.

Lobbyisman

Hóast ein felagsskapur sum FISC kann hava stóran týdning sum lobbyistur fyri føroyskum áhugamálum, so heldur Louis Wilson tó, at besta lobbyisman er tað arbeiði, sum verður gjørt millum politikarar. Við hesum sipar hann til eitt gamalt ynski hjá sær, nevniliga hetta at fáa knýtt bond millum føroyskar og bretskar politikarar og flokkar. Hann vísir á, at tað er einki óvanligt, at tað í

Louis Wilson og Marjun King frammanfyri bretska parlamentið. Mynd jan

parlamentum finnast bólkar við tingmonnum, oftani úr fleiri flokkum, sum taka sær av málum, ið viðvíkja ávísum londum. Tað kundi t.d. verið hugsandi, at tað var ein slíkur føroyskur-enskur bólkur í bretska parlamentinum. Eisini kundi hugsast, at flokkar í Føroyum knýttu sambond við bróðurflokkar sínar í Bretlandi. Eitt nú heldur Louis Wilson, at hevði ikki verið nakað vanaligt hugskot, um t.d. føroyski javnaðarflokkinum knýtti bond saman við systurflokki sínum í Bretlandi, sum eftir øllum at døma fer at koma í stjórn eftir komandi val. Eitt samstarv longu nú hevði kunnað ruddað slóð fyri samarbeiði millum londini og gjørt tað lættari hjá føroyingum sum heild at fingið vælvild frá eini komandi enskari laborstjórn – ella hvussu er kundi ein tryggjað sær, at hon betur kendi tey serføroysku sjónarmiðini og áhugamálini á ymsum økjum.

Donskar sendistovur kunnu vera falsk trygd

Tað er so ikki úr leysari luft og ikki á manglandi royndir, at Louis Wilson setur hesar tankar fram. Tí í sínum arbeiði í FISC til frama fyri føroyska grindadrápinum hevur hann m.a. sannað, at teir og tey, sum í veruleikanum áttu at tikið sær av føroyskum áhugamálum, nevniliga donsku sendistovurnar - ambassaðurnar - gera hetta ikki.

Tá vit byrjaðu við arbeiði okkara at kunna bretskar fjølmiðlar og politikarar um grindadráp og vísa aftur órættvísu herferðini frá ávísum umhvørvisfelagsskapum, settu vit okkum sjálvandi í samband við donsku sendistovuna í London fyri at fáa hennara stuðul. Men har løtust teir ikki um vón. Ikki ein gang fingu vit aftursvar upp á brøv okkara. Tað er tí ikki ov nógv sagt, at tað er falsk trygd, um føroyingar halda, at danskar sendistovur taka sær av og verja føroysk áhugamál.

Tí haldi eg, at tað er so umráðandi at kunna fáa bygt upp eitt samskifti millum føroyskar og bretskar politikarar, soleiðis at føroyingar á henda hátt kunnu royna at ávirka bretskar politikarar til at skilja og taka undir við okkara sjónarmiðum, ikki bert tá talan er um grind, men eisini viðvíkjandi spurninginum um undirgrundarmarkið, samarbeiði um eina komandi oljuvinnu osfr.

Bjóðar seg fram sum ráðgeva

Her er vissuliga eitt stórt arbeiði at gera, og Louis Wilson vil fegin vera við til at hjálpa føroyingum at fáa gliðið á. Sjálvur arbeiðir hann í dag í skattaumsitingini í London men ætlar sær í næstum at byrja fyri seg sjálvan eitt nú sum ráðgevi. Og her kundi hann hugsað sær at ráðgivið eitt nú føroyskum fyritøkum, flokkum o.ø. hvussu føroyingar fáa betri fótafesti í bretska høvuðsstaðnum.

Louis Wilson ger greitt, at hetta skal ikki skiljast sum at føroyska umboðsstovan í Abereen ger ov lítið.

Tvørturímóti haldi eg at umboðsstovan har hevur ómetaliga stóran týdning, men tað er langt millum Aberdeen og London, og tað er greitt, at her í London, har alt valdið er savnað, finnast nógvar aðrar og nýggjar uppgávur at taka sær av, um so er, at føroyingar og bretar í framtíðini skulu til at økja um samstarvið.

Í fjør summar vitjaði Louis Wilson í Føroyum og nýtti hann m.a. høvi til at hitta Edmund Joensen, løgmann. Tá greiddi hann løgmanni frá arbeiðinum hjá FISC í sambandi við herferðina móti grindadrápi.

Á fundinum við løgmann nýtti hann eisini høvi til at greiða honum frá møguleikanum fyri øktum samskifti millum føroyskar og bretskar parlamentarikarar.

Eg haldi tað eigur at verða beinleiðis samband millum parlamentini í báðum londum beint uttan um danska uttanríkisráðið.

Louis Wilson heldur tað kann liggja ein vandi fyri føroyingar í tí blint at dúva uppá, at danir te. serliga uttanríkisráðið og sendistovur tess sjálvboðnar ella eftir áheitan taka sær av føroyskum áhugamálum.

Hetta kann lættliga gerast falsk trygd, og tí er nógv betur við beinleiðis sambandi millum londini uttan um Danmark. Føroyingar sjálvir vita eisini nógv betur, hvørji mál kunnu hava týdning at taka upp leggur Louis Wilson aftrat.

jan

Grundskeið
fyri álitisfólk

Um nóg nógv teknað seg, verður grundskeið fyri álitisfólk í døgunum 15 til 18. januar á Hotel Vágum

Skeiðið byrjar mánadagin kl. 9.00 og endar hósdagin kl. 16.00

Áhugað kunnu venda sær til U.V. á tlf 13995 ella fax 19738

Upplýsingarfelagsskapur Verkamanna